## VIÐMERKINGAR

# Góðan dag, Føroyar!

**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Óansæð um komandi løgtingsvalið skal vera ein uppgerð millum vinstru og høgru ella samband og fullveldi, so er valdagurin 20. januar ein einastandandi møguleiki hjá Føroya fólki.

Taka vit tann borgarliga politikkin, so er eyðsýnt, at Fólkaflokkurin fullkomuliga hevur spælt fallit hesi fimm farnu árini, tí almennu útreiðslurnar eru blivnar himmalhøgar, hóast flokkurin sigur seg standa fyri øðrum politikki, tá lesast skal úr stevnuskrá og politiskum málsetningi.

Her hevur einki hingið saman, og tað dugir veljarin sjálvandi lættliga at rokna út, tí hann letur seg ikki lumpa fleiri ferðir.

Hyggja vit so at spurninginum um samband ella loysing, er enn minni at fara skeivur av, tí Tjóðveldisflokkurin hevur uttan kumpass roynt at stýrt síni fullveldisskútu. Kósin hevur verið hareftir!

Ein skuldi trúð, at fyrsta fyritreytin fyri fullveldi var at fáa beinini undir seg, men tvørturímóti hevur verið kappað undan, so bæði politikkur og hugsjón at enda máttu fara um koll. Annað bar snøgt sagt ikki til.

Tá hesir flokkar alment hava latið seg úr og givið til kennar, at teir eru innantómir og uttan politiskt gonguvit, er komandi løgtingsvalið kærkomin kjansur at hjálpa Føroyum á føtur aftur.

Saman við Sambandsflokkinum kanst tú hyggja frameftir og líta á, at rikin verður ein ábyrgdarfullur realpolitikkur, ið fer at gera tað liviligari at liva í hesum landinum. Ikki bara eina ferð í framtíðini, men nú og í framtíðini!

# Sukuravgjaldið exit

**Johan Mortensen,**
*Restorffs Bryggjarí*



Tað er at harmast um, at okkara politiska verðurlag ikki er meira støðugt, men á hinum bógvinum er at fegnast um, at ætlaða sukuravgjaldi hjá fráfarandi landsstýri fór aftur við borðinum.

Uppskotið var sera illa umhugsað og vóru fleiri læknar og tannlæknar ivingarsamir um nyttuna av slíkum ætlaðum avgjaldi. Verri var kanska, at hvørki av teimum føroysku bryggjaríunum vóru kunnaði ella hoyrd av Heilsumálastýri, Fíggjarmálastýri ella Fíggjarnevnd, ein óhoyrd og ófólkalig framferð havandi i huga teir trupulleikar, uppskotið vildi havt fyri bryggjaríini. Heldur enn at pretendera, at uppskotið var fyri fólkaheilsuna var tað ein illa fjald roynd at skaffa inntøkur til eina fíggjarlóg, sum ein og hvør kann síggja er órealistisk og ikki fer at halda.

Nevnast kann at á Føroya Bjór og Restorffs Bryggjarí eru tilsamans sløk 40 arbeiðspláss og umframt arbeiðslønir, MVG osfrs., gjalda hesi feløg umleið Kr 25 Mio árliga í avgjøldum til Landskassan. Heldur enn at leggja stein oman á byrðu átti Landsstýrið at lívgað hesum arbeiðspløssum við t. d. at lagt eitt innflutningsgjald á alt tað útlendska ølið og sodavatnið, sum floymir inn í landið sum t. d. Ísland ger fyri at verja síni arbeiðspláss.

Tað er okkara vón, at komandi Landsstýri fer at geva føroyskum arbeiðsplássum størri ans og vóna vit somuleiðis, at næsti landsstýrismaður í Vinnumálum er so frætt at sær komin, at hon/hann torir at taka stig til at ajourføra okkara avoldaðu Rúsdrekkalóg; at loyva sølu av øli og víni í handlum og at loyva framleiðslu av rúsdrekka í Føroyum.




# Virðisbrævamarknaðir í jólafrí

MARKNAÐARRÁK

Orsakað av mongu halgi- og frídøgunum um jólini og nýggjárið, er sera stórur partur av marknaðarluttakarunum farnir í jóla- og nýggjársfrí. Hetta hevur ført við sær, at sera friðarligt hevur verið á marknaðunum seinastu dagarnar.

Tollaksmessudag var endaliga staðfest, at búskaparvøksturin í USA gjørdist 8,2% í 3. ársfjórðingi. Hetta er sum áður nevnt hægsti búskaparvøkstur í einum ávísum ársfjórðingi síðani 1984. Samstundis vístu uppgerðir jólaaftan, enn einaferð, at arbeiðsmarknaðurin í USA er í framgongd. Hinvegin gjørdist uppgerðin fyri bíleggingarnar av varandi nýtsluvørum negativ.

Seinastu dagarnar hava vánaligar búskaparligar uppgerðir havt lutfalsliga størri ávirkan á virðisbrævamarknaðirnar, og tá ávarað samstundis hevur verið um møguligar yvirgangsatsøknir, eru lánsbrævarenturnar í USA sum heild lækkaðar um jólini. Rentulækkingin í USA hevur ført við sær, at eisini lánsbrævarenturnar um okkara leiðir eru falnar.

Verður hugt eftir effektivu rentuni á eitt nú danska lánsbrævinum við 10 ára gildistíð, er hendan á lægsta stigi síðani byrjan av oktobur. Sum heild eru lánsbrævarenturnar falnar javnt og samt í desembur mánaða, og hetta hevur ført við sær, at lánsbrævaíløgur hóast alt, hava verið hampuligar í ár, sammett við vanligt innlán.

Mánamorgunin 29. desembur setti amerikanski dollarin aftur nýtt met. Tó kostaðu 100 dollarar einans 596,39. Ein orsøk til hetta er, at neytaøði er staðfest í USA. Ilt er at siga hvussu umfatandi neytaøðin er, men tað er ein sannroynd, at um neytaøði fer at gera um seg í USA, er hetta tálmandi fyri amerikanskan útflutning og kann økja um hallið á teirra handilsjavna. Tí er vandi fyri, at dollarin kann vikna enn meira. Hetta økir um sannlíkindið, at veiki dollarin fer at seta dám á virðisbrævamarknaðirnar í byrjanini av 2004. Møguleiki er tískil fyri, at ECB fer at lækka leiðandi evropisku rentuna. Hetta er tó lítið sannlíkt enn, men víst er, at hendan rentan ikki verður hækkað í bræði.

Fleiri av heimsbúskapunum eru í 2003 farnir frá afturgongd til framgongd. Tá flestu partabrævamarknaðir samstundis vóru á sera lágum stigi við ársbyrjan av 2003, hevur 2003 eisini verið eitt sera gott partabrævaár.

Trupult er at siga hvussu 2004 fer at roynast. Fyrstu ábendingarnar koma tó miðskeiðis í januar, tá gongd kemur á roknskapirkunngerðirnar fyri 2003.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,74% | -0,05% |
| 5 ára lánsbræv | 3,59% | -0,04% |
| 10 ára lánsbræv | 4,41% | -0,03% |

**Partabrævavísitol**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 245,2 | 0,9% |
| OMX, Svøriki | 632,8 | 2,3% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.644,3 | 0,9% |
| S&P 500, USA | 1.095,9 | 0,3% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,36 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 164,44 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 71,79 | 1,1% |
| Altjóða Partabrøv | 71,97 | 0,4% |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 596,42 | -0,6% |
| EUR | 744,27 | 0,0% |
| GBP | 1.058,03 | 0,0% |
| NOK | 88,46 | -0,7% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



## VIÐMERKINGAR

# SEV skal steðgast

**John Johannessen**
*Valevni fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymi*



**Valdið yvir náttúruni í Føroyum skal liggja hjá Føroya fólki. Tí skal tað ikki vera SEV, men Føroya Løgting, ið setur yvirskipaða orkupolitikkin út í kortið.**

Enn fleiri áir verða turrlagdar. Árini á náttúruna eru ikki kannað. Men SEV heldur tað vera smart at brúka 150 milliónir at gera áirnar til steym. Og so verður tað gjørt. Ongin skal seta spurnartekin, tí soleiðis arbeiðir SEV. Og SEV hevur alt vald.

Fyri tað, er tað ikki vist, at fólkini í SEV eru serstakliga órein og ómøgulig. Tað er bara ongin, sum setur teimum mørk. Náttúruvernd, umhvørvis- og orkupolitikkur, er nakað, sum politikararnir í Føroyum hava hildið seg langt burtur frá. Burtursæð frá, tá teir eru farnir á dýrar ráðstevnur úti í heimi at spæla, at vit eru við. Tí hevur SEV fingið óavmarkað vald at gera sum tað vil.

**Valdið til Løgtingið**
Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri at fáa veruliga valdið á náttúru- og umhvørvispolitikkinum til Føroya Løgting, har tað hoyrir heima. Tað skal vera Føroya Løgting, ið ger av, hvussu býtið skal vera millum orkukeldurnar í Føroyum.

Málið er at fáa eina reinari orkuframleiðslu.. Tað vil siga, at løgtingið við lóg skal gera av, hvussu stórur partur av orkuni skal framleiðast burtur úr vindi, vatni, aldum, motorum og so framvegis.

Vit skulu gera eina greiða ætlan um eina reinari orkuframleiðslu í Føroyum. Ein ætlan, sum verður staðfest við lóg. Harvið fær SEV greiðar reglar at arbeiða eftir. SEV verður kravt at halda sínar skyldur móti føroysku náttúruni. Umhvørvið verður reinari. Og Føroyar lúka í sama viðfangi ein part av sínum skyldum í heimssamfelagnum.

Veruligt sjálvbjargni er eisini at halda sínar altjóða skyldur.

# Eitt val

**Svenning Borg**
*Vágur*



Fullveldi kollsigldi og er tað onki hjá Føroyingum at verða keddir av,nú blivu so ikki fráboðaðu avgjøldini til veruleika, rentufrádrátturin skuldi jú avtakast saman við skattafrádráttinum hjá fiskimonnunum, minstiforvinningurin til útróðrarmenn avtakast, M.V.G. skuldi broytast ,alt fyri at fáa meira inn í landskassan, hesin sami landskassi, sum ongantíð áður hevur fingið so nógvar pengar inn, má hava meira pengar og hví, jú attaná 6árá vanstýring mangla pengar í og var hettar helst høvuðsorsøkin til,at fullveldi kollsigldi.

Hettar hava føroyingar uppliva fyrr og er hettar bert vanligt fyri føroyska fullveldi, tað mangla altíð pengar í, uttan mun til hvat føroyska tjóðin tjenar, so klárar fullveldi at brúka meir enn hvat í tjóðin tjenar, var allur blokkurin avtikin,so vórðu føroyar seldar ella undir fíggjarligum eftirlitið,tað er onki at ivast í.

Nú sleppa so føroyingar aftur at velja,og skuldi tað verði lætt at valt,persónligt frælsi, hvar í hvør kann svara sínum sítt ella fullveldis frælsi,hvar í ongin klárar hvørjum sítt

Persónligt frælsi finnur tú á lista B

Viðskiftafólki okkara takka vit fyri gott samstarv í farna árið við ynski um eitt gott nýggjár

Vit lata uppaftur:
5. januar 2004 kl. 10.00

BIGA
Køkar gjørdir við nærlagni



# Sølu- og marknaðarstjóri til Smyril Line

Smyril Line hevur avgjørt at savna alt ferðafólkavirksemið í eina sølu- og marknaðar-deild og søkir tí eftir einum dugnaligum sølu- og marknaðarstjóra at standa fyri framhaldandi menningini av virkseminum.

Tað liggur ein stór leiðsluuppgáva í at sameina, leiða og menna tey meira enn 40 starvsfólkini, sum nú skulu savnast í eina sølu- og marknaðardeild.

**Ábyrgdarøkini og arbeiðsuppgávurnar hjá sølu- og marknaðarstjóranum verða:**
- Fáa sum mest burtur úr sølu- og marknaðarvirkseminum - innanhýsis og uttanhýsis
- Áhaldandi meta um marknaðarvirksemið og úrslitið av hesum
- Skipa kundabólkar og menna tænastur
- Gera greiningar og uppskot um nýtt virksemi
- Skipa fyri tænastumenning
- Evna til, leggja fram og seta í verk sølu- og marknaðarætlanir
- Leiða og eftirmeta marknaðarvirksemið hjá deildunum uttanlands
- Stuðla aðalsøluumboðunum og samráðast við tey um virksemi
- Eftirmeta sølu- og marknaðarvirksemið hjá aðalsøluumboðunum
- Læra upp og menna sølufólkini á deildunum og hjá aðalsøluumboðunum
- Leggja fíggjarætlanir og eftirmeta sølumálini

*Roknast skal við nógvari ferðing í starvinum.*

**FØRLEIKAKRØV**
Til tess at kunna røkja starvið hevur sølu- og marknaðarstjórin helst eina sølubúskaparliga útbúgving sum t.d. cand.merc. ella HD í sølu. Harumframt eigur hann at hava drúgvar leiðsluroyndir - helst í altjóða høpi - frá eini sølu- og marknaðardeild.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur kunnleika um ferðavinnu.

Tað hevur týdning, at tann, ið settur verður, er vanur at arbeiða við søluumboðum og hevur góðan kunnleika at leiða dótturfeløg ella deildir - serliga í samband við broytingar-tilgongdir.

Starvið hevur sostatt í sær bæði leiðlsu, sølu og marknaðarføring. Umsøkjarar við hollum royndum innan leiðslu í sølu verða tó tiknir framum.

Sølu- og marknaðarstjórin skal vera fyrikomandi og vera vanur at tosa við fólk á øllum stigum í samfelagnum. Tað hevur týdning at hava royndir í at leggja fram nýtt virksemi og nýggjar vørur og á tann hátt vera førur fyri at skapa motivatión og eldhug hjá starvsfólkum og samstarvsfeløgum.

Tað skal vera ein natúrligur eginleiki hjá umsøkjaranum at vera stigtakari og koma við uppskotum um nýtt virksemi, eins og hann skal duga at røkka settum málum og úrslitum. Eftirmeting av marknaðarætlanum, virksemi og fíggjarætlanum skal vera eitt vælkent amboð í hondunum á nýggja sølu- og marknaðarstjóranum.

Umsøkjarin skal duga enskt á høgum stigi bæði í skrift og talu.

Sølu- og marknaðarstjórin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran Óla Hammer, og hann møtir á nevndarfundum, tá spurningar við-víkjandi sølu og marknaðarføring verða við-gjørdir.

**SMYRIL LINE BJÓÐAR**
Komandi sølu- og marknaðarstjórin á Smyril Line verður settur í eitt nýstovnað starv, sum hann sjálvur fær stóra ávirkan á. Talan er um eitt ógvuliga sjálvstøðugt starv við stórum frælsi.

Smyril Line er ein framsíggin og framtakssom fyritøka við einum høgum virkisstigi. Samverulagið í felagnum er óformligt, og starvsfólkini eru eyðkend fyri sín stóra egináhuga í arbeiðinum.

Rætti umsøkjarin fær góða løn og eftirløn.

**UMSÓKNIR**
Smyril Line hevur biðið headhunterfyri-tøkuna, SAM International A/S, leita eftir nýggja sølu- og marknaðarstjóranum. Tí skulu allir fyrispurningar, umsóknir og CV stílast til:

**Headhunter Stig Kromann - Andersen**
Skovdalen 7
3500 Værløse
Danmark
Telefon: 0045 44 44 03 32
Teldubústaður: ska@sam-int.com

Seinasta freist at søkja starvið er 8. januar 2004. Allar umsóknir og fyrispurningar verða viðgjørd í trúnaði.

Smyril Line varð stovnað í 1982 við tí endamáli at knýta oyggjasamfeløgini í Norðuratlantshavi, Føroyar, Ísland og Hetland, tættari at Noreg, Danmark og restini av meginlandinum. Smyril Line er í dag einasta reiðarí, sum røkir ferðafólkaflutning í Norðuratlantshavi.

Á vári 2003 tók felagið nýggju cruise-ferjuna, M/F Norrönu, í nýtslu. Ferjan tekur 800 bilar og uml. 1.500 ferðafólk. M/F Norröna siglir alt árið í fastari rutu millum Føroyar, Danmark,Noreg, Hetland og Ísland. Nýggja ferjan uppfyllir ynskini hjá nógvum evropeiskum ferðafólkum um eina virkna frítíð í Íslandi, Føroyum og Hetlandi.

Smyril Line hjálpir eisini ferðafólkum á norðuratlantisku ferðamálunum við at leggja til rættis eitt nú útferðir, gisting og bilaleigu. Harumframt veitir felagið eisini teimum ferðandi - bæði einstaklingum og bólkum - ymsar pakkaloysnir á staðnum.

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn og skrivstovur við egnum starvsfólkum í Hanstholm,Bergen, Lerwick og Reykjavík. Reiðaríið hevur aðalsøluumboð í Svøriki, Týsklandi, Sveis, Benelux-londunum, Fraklandi, Eysturríki og Italia. Starvsfólkatalið í Smyril Line samtakinum er umleið 350 ársverk.

Smyril Line er í eini spennandi menningartíð og áhugin fyri vørum og tænastum hjá felagnum økist alsamt.
Í 2003 er flutningurin av ferðafólki øktur 52 prosent, og verður roknað við støðugari øking í komandi árum.
Fleiri upplýsingar um felagið fáast á www.smyril-line.fo